# Húsavørður til P/F Fastogn

**P/F Fastogn**
*P/F Fastogn varð stovnað í 2003 og endamálið við felagnum er at gera íløgur í fastognir. Leiguvirksemið í dag umfatar sølumiðstøðir, skrivstovuhølir og framleiðslubygningar.*

Eitt hálvtíðarstarv sum húsavørður hjá P/F Fastogn er leyst at søkja. Søkt verður eftir einum fólki, sum kann átaka sær uppgávuna at viðlíkahalda og gera minni umvælingararbeiði á bygningarnar hjá felagnum.

**Um teg:**
- Tú ert handverkari og/ella handaligur
- Tú ert røkin
- Tú ert álítandi
- Tú hevur koyrikort

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt starv sum er áleið hálva tíð, sum møguliga kann gerast eitt fulltíðarstarv
- Eitt sjálvstøðugt starv
- Løn sambært avtalu.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at ringja og fáa meiri upplýsingar um starvið við at venda tær til Gordon Rajani á tlf. 351519 og 551519.

Skrivlig umsókn kann sendast til:

**P/F Fastogn**
Att.: Gordon Rajani
Bókbindaragøta 8
Boks 3090 · FO-100 Tórshavn

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Maskinmeistari

Vegna farloyvi verður søkt eftir maskinmeistara í tíðarskeiðnum 1. september 2006 til 1. oktober 2007.

Talan er um fulltíðarstarv við tilkallivakt.

Umsøkjarar skulu hava maskinmeistaraútbúgving.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til maskinmeistarin Mikkjal Bærendsen tlf. 37 11 33.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Umsjónarmaðurin
Postsmoga 51
810 Tvøroyri

**Umsóknarfreist** 31. juli 2006.

# Summarfrí

Vit eru í summarfrí frá 17. juli. Byrjað verður aftur 14. august.

**Sp/f Petur Hammer, Tvøroyri**

# Avloysari

Eitt fulltíðarstarv sum avloysari fyri roknskapar-, móttøku- og avgreiðslufólk í farloyvi í tíðarskeiðinum 1. august 2006 til 1. august 2007 er leyst at søkja.

Umframt bókhald og vanligt skrivstovuarbeiði, skal tann, ið settur verður, eisini luttaka í øðrum útflutningsfremjandi arbeiði, so sum at svara útlendskum fyrispurningum um møguligar samstarvsfyritøkur í Føroyum og at vera við í arbeiðinum at fyrireika og gjøgnumføra handilsferðir og framsýningarátøk uttanlands.

Vit hugsa okkum, at tú hevur kunnleika til alt vanligt skrivstovuarbeiði og eisini dugur at arbeiða við FSL - Fíggjarstýringsskipan Landsins.

Arbeiðsøkið hjá Menningarstovuni er rættiliga fjølbroytt við nógvum spennandi uppgávum, ið seta krøv um góð samstarvsevni. Tí vænta vit, at tú sum persónur er fryntligur og fyrikomandi og hevur góðan kunnleika í bæði føroyskum og enskum og lættliga kann samskifta við bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur.

Setanarviðurskiftini eru sbrt. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir vera at senda Menningarstovuni í seinasta lagi 27. juli 2006.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Menningarstovan**
*Faroe Islands Trade Council*
Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · 110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær ti Kjartan Kristiansen, 353100 ella 216117.

# Summarferia

Stongt er frá mánadegi 17. juli. Opið er aftur týsdagin 8. august 2006.

Studulsstovnurin

Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn
telefon 356800 · faks 356801
t-postur: studul@studul.fo
heimasíða: www.studul.fo

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg

FAROE
LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FO-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo

*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Klaksvíkar Kommuna / Mentanardeildin



# Skúlabarnakoyring

**Skúlabarnakoyringin í Klaksvík verður við hesum boðin út**

Útbjóðingartilfar við upplýsingum um leiðir og treytir annars er greitt at heinta á býráðsumsitingini frá 17. juli - til 31. juli 2006.

Klaksvíkar Kommuna ynskir at gera sáttmála við ein arbeiðstakara, um skúlabarnakoyring í kommununi í eitt tvey ára skeið.

**Tilboð skulu verða Mentanardeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin 10. august 2006, kl. 13:00 og vera merkt "Tilboð viðvíkjandi skúlabarnakoyring í Klaksvíkar Kommunu"**

Fyrispurningar kunnu settast Mentanardeildini á tlf 41 00 00 ella umvegis teldupost til Dáva Winther: **dw@klaksvik.fo**

**Klaksvíkar býráð**
**Postboks 2**
**700 Klaksvík**

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo